# HB reisti seg



**Við væluppløgdum útisetum, vunnu havnarkvinnur sannførandi á B68 í Gundadali**

*HB-kvinnurnar fingu uppreisn í vikuskiftinum, tá tær vunnu uppibornan 3-1 sigur á B68 í Gundadali*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

1. DEILD KVINNUR
*Páll Holm Johannesen*

Eftir nakrar slakar dystir, reistu HB-kvinnurnar seg um vikuskiftið. Tær fingu sunnudagin vitjan av B68, og vunnu uppiborið 3-1, eftir hálvleiksstøðuna 1-0.

Hjá HB mátti sigurin koma væl við, tí eftir stórtapið í steypafinaluni, og heldur óvæntaða ósigurin ímóti GÍ í Gundadali, hevur verið brúk fyri at vend skuldi koma í, um nakað heiðursmerkið skal koma burturúr í ár.

Undan dystinum ímóti HB, høvdu toftakvinnur staðið seg rættiliga væl, og høvdu vunnið fleiri dystir upp í slag, og liðið hevur verið mett at verið eitt av evnunum til eitt heiðursmerki í bestu kvinnudeildini.

## HB yvirvág

HB hevði leikliga yvirvág meginpartin av dystinum, og tað vóru eisini havnarkvinnur, sum høvdu flestu málmøguleikarnar.

Fyrsta málið í dystinum fall miðskeiðis í fyrra hálvleiki, og tað fekk heimaliðið. HB-kvinnurnar fanga bóltin á miðjum vølli, og Eyðfríð Kristiansen strýkur avstað, og komin ímóti B68-málverjanum, lyftir hon bóltin hegnisliga uppum málverjan, og so stóð 1-0 til HB.

Ikki fleiri mál komu í fyrra hálvleiki, hóast málmøgleikar vóru til tess.

Seinni hálvleikur var ikki meir enn byrjaður, so hevði heimaliðið økt um leiðsluna. Kristina Simonsen og Malan á Dunga spældu sína millum, og tað endaði við, at Kristina fekk bóltin framvið B68-málverjanum.

HB helt áfram at hava leikliga yvirvág í øðrum hálvleiki, og B68 hevði sera torført við at fáa sítt spæl at koyra. Úr Havn verður sagt, at serliga útisetarnir hjá HB, Eyðvør úr Dímun, Liljan Petersen, Annika Godtfred og Silja á Borg høvdu ein góðan dag, og at gestirnir aldrin rættiliga fótaðu sær.

Tíggju minuttir inn í seinna hálvleik, var aftur galið hjá toftakvinnum. Eftir hornaspark frá Maluni á Dunga, er Eyðvør úr Dímun fyrst á bóltinum, og leggur HB á odda 3-0.

Dysturin var tá í royndu veru avgjørdur. 3-0 leiðslan av fult uppiborin, tí havnarkvinnur vóru nógv ágrýtnari henda dagin.

B68 fekk eitt troyst-mál stutt fyri leiklok. Anna Maria Kruse var fyrst á bóltinum, eftir hornaspark, og kundi minka um munin fyri toftakvinnur. Tættari kom B68 ikki, og endaliga støðan gjørdist 3-1 til heimaliðið, og sigurin var fult uppiborin.

## HB á triðja plássi

Eftir sigurin í vikuskiftinum eru HB-kvinnur at finna á einum triðja plássi við fýra stigum, ájavnt við bæði B68 og GÍ. Havnarkvinnur hava verið sera óstøðugar í ár, so ilt er at spáa um, hvussu fer gangast teimum komandi vikurnar. Hvussu verður og ikki, so fara útisetarnir av landinum aftur seinast í mánaðinum, og um tað tá verður soltnari við stigum, fer bara tíðin at vísa.

Fyri B68 var ósigurinn tann fyrsti í longri tíð, og spennandi verður um tær reisa seg í kvøld, tá tær fáa vitja av GÍ á Svangaskarði.

**Dysturin i tølum:**
**HB-B68 3-1 (1-0)**
1. Eyðfríð Kristiansen
2. Kristina Simonsen
3. Eyðvør úr Dímun
3-1 Anna Maria Kruse

## Eitt umfar í kvinnudeildini í kvøld

Av tí, at U19-landsliðið hjá kvinnunum skal leika í EM.undankapping í heyst, verður eitt umfar hjá kvinnunum leikt í kvøld. B36 spælir á heimavølli ímóti Skála, KÍ fær vitjan av HB og toftakvinnur møta GÍ á Svangaskarði.

***phj***

## Støðan 1. deild kvinnur

| nr | felag | d | v | j | t | málúrtøka | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 2 | 2 | 0 | 0 | 13-2 | 9 |
| 2 | B36 | 2 | 1 | 0 | 1 | 2-4 | 5 |
| 3 | HB | 2 | 1 | 0 | 1 | 5-4 | 4 |
| 4 | GÍ | 2 | 1 | 0 | 1 | 3-3 | 4 |
| 5 | B68 | 2 | 1 | 0 | 1 | 5-6 | 4 |
| 6 | Skála | 2 | 0 | 0 | 2 | 4-13 | 0 |

## Málskjúttar í endaspælinum

| | | |
|---|---|---|
| Malena Josephsen | KÍ | 4 |
| Rannvá Andreasen | KÍ | 3 |
| Elsa Maria Simonsen | KÍ | 3 |
| Hansy Davidsen | B68 | 2 |
| Heidi Heinesen | GÍ | 2 |
| Eyðvør úr Dímun | HB | 2 |
| Anja Weihe | B36 | 2 |
| Anna Kristina Joensen | GÍ | 1 |
| Malan á Dunga | HB | 1 |
| Eyðfríð Kristiansen | HB | 1 |
| Kristina Simonsen | HB | 1 |
| Jóna Petra Thomsen | Skála | 1 |
| Poula D. Olsen | Skála | 1 |
| Elin Jacobsen | Skála | 1 |
| Gerda Magnussen | Skála | 1 |
| Majbritt Olsen | B68 | 1 |
| Anna Malena Højgaard | B68 | 1 |
| Anna Maria Kruse | B68 | 1 |
| Vivian Bjartalíð | Kí | 1 |
| Jensa Sirdal | Kí | 1 |
| sjálvmál | | 1 |

# B36 vann tepurt í Gøtu

**B36-kvinnurnar megnaðu ikki at gera sær dælt av, at tær vóru 11 ímóti 10 stóran part av dystinum**

1. DEILD KVINNUR
*Páll Holm Johannesen*

Lagt var upp til spennandi dyst í Gøtu sunnukvøldið. B36 skuldi reisa seg eftir tapið í Klaksvík, og GÍ skuldu royna at halda fast við góða spælið, teir sýndu í Gundadali ímóti HB.

Dysturin var eisini javnur, við málmøgleikum til bæði liðini, men tað var havnarliðið, ið streyk avstað við øllum trimum stigunum. Dysturin endaði 1-0 til B36, eftir ein málleysan fyrra hálvleik.

## Gøtukvinnur 10 ímóti 11

Dysturin fekk eina dramatiska byrjan, tí longu eftir fáar minuttir, fekk heimaliðið ein leikara vístan av vøllinum. Talan var um beinleiðis reytt kort, eftir at ein GÍ-leikari hevndi seg inná B36-leikara.

Hóast gøtukvinnur vóru stóran part av dystinum ein leikari færri enn gestirnir, so megnaði B36 ikki at gera sær dælt av støðuni. Bæði liðini stríddust væl, og spældu seg fram til fleiri málmøguleikar. Úr Gøtu verður sagt, at GÍ-málverjin, Anna Kristina Joensen, stóð ein rættiliga góða dyst.

Fyrri hálvleikur endaði málleysur, hóast bæði liðini, við eitt sindur hepni, kundu fingið okkurt málið. Stutt inn í seinna hálvleik bragdaði hjá B36-kvinnunum. Eftir eina sending frá Mariu Vang, eydnaðist Anju Weihe at fáa bóltin framvið Onnu Kristinu í GÍ-málinum, og so stóð 1-0 til B36

Eftir málið leikaði javnt á, og málmøguleikar vóru framvegis báðar vegir. B36 megnaði tó at halda fast um leiðsluna, og harvið eisini trý kærkomin stig.

## B36 aftur á øðrum plássi

Við sigrinum í Gøtu, fóru B36 frammum gøtukvinnur, og liggja nú fýra stiga aftanfyri Kí í stríðnum um FM-heiti. Í kvøld fáa B36-kvinnurnar vitjan av Skála í Gundadali, og tá fáa tær møguleika at minka um frástøðuna til KÍ, um oddaliðið skuldi snáva í sínum dysti ímóti HB.

Fyri GÍ hevði ósigurin við sær, at liðið framvegis hevur fýra stig, og liggur ájavnt við HB og B68 á einum triðja plássi

**Dysturin í tølum:**
**GÍ-B36 0-1 (0-0)**
0-1 Anja Weihe



# KÍ-stórsigur á Skála

**KÍ-kvinnurnar lótu ongn iva vera um, at tað er munur á einum meistaraliði og einum uppflytara**

1.DEILD KVINNUR
*Páll Holm Johannesen*

Undan dystinum á Skála sunnudagin, var ávísur spenningur um, hvussu uppflytarnir av Skála fóru at standa seg ímóti oddaliðnum úr Klaksvík. Skála vísti gott spæl ímóti B68 vikuna undan, og nú tær skuldu royna seg á heimavølli ímóti nýklaktu steypavinnarunum, vóru tað fleiri, sum væntaðu ein javnan dyst.

Hetta gjørdist kortini aldrin veruleiki, tí KÍ-kvinnurnar prógvaðu, at tað er also munur á 1. og 2. deild, og við einum knúsandi 9-1 sigri, settu tær Skála-kvinnur uppá pláss.

## Einvegis ferðsla

Allan dystin høvdu klaksvíkskvinnur yvirvág, og álopinini skolaðu oman ímóti málinum hjá Skála. Tað vóru ikki meiri enn tíggju minuttir farnir, so stóð 2-0 til gestirnar. Skálakvinnur royndu sum frægast í fyrra hálvleiki, og tær royndu so dánt at fylgja við KÍ-kvinnunum.

Fyrri hálvleikur var eisini meira javnur enn seinni, og tað tyktist sum, at luftin fór úr Skála-kvinnum í seinna hálvleiki. Hálvleiksstøðan var eisini »bara« 3-1 til KÍ.

Í seinna hálvleiki gekk verri hjá heimaliðnum, tí tá liðini høvdu rundað tíman, stóð longu 6-1 til klaksvíkskvinnur. KÍ- kvinnur góvust ikki so, og tá dysturin var av, stóð heili 9-1 til útiliðið.

Málskjúttar á Skála fyri KÍ vóru, Elsa Maria Simonsen og Malena Josephsen trý hvør, Jensa Sirdal og Vivian Bjartalið eitt í part, meðan Skála gjørdi eitt sjálvmál. Málið hjá Skála gjørdi Gerda Magnussen

## Skála styrkt sær um liðið

Undan dystinum ímóti Kí, høvdu Skála-kvinnur leitað sør styrk av Sandoynni. Fýra sandoyargentir vóru á vøllinum á Skála sunnudagin. Martin Kúrberg er venjari hjá Skála í ár, og fyri nøkrum árum síðani stóð Martin á odda fyri kvinnuliðnum hjá B71, og tað er allarhelst soleiðis sambandið er komið í lag.

**Dysturin í tølum:**
Skála-KÍ 1-9 (1-3)
0-1 Elsa Maria Simonsen
0-2 Malena Josephsen
1-2 Gerda Magnussen
1-3 Vivian Bjartalið
1-4 Malena Josephsen
1-5 Elsa Maria Simonsen
1-6 sjálvmál
1-7 Malena Josephsen
1-8 Elsa Maria Simonsen
1-9 Jensa Sirdal

# Danskur stórmeistari á vitjan



*Danski stórmeistarin, Peter Heine Nielsen, er í løtuni í Føroyum í summarfrí, men hann sleppur ikki kortini so undan telvingini.*

*Mynd: Sveinur Thomasen*

**Peter Heine Nielsen er í Føroyum í summarfrí, men kortini hevur hann tíð til at vísa sínar talvdygdir**

TALV
*Páll Holm Johannesen*

Kendi danski Stórmeistarin í talvi, GM Peter Heine Niel sen er í hesum døgum á vitjan í Føroyum. Peter Heine er 29 ár og er nummar 53 á heimsins styrkilista við eini rating uppá 2636 stig, 202 stig aftanfyri Garry Kasparov sum er sterkastur við 2838 stigum.

Peter Heine Nielsen er annars ikki í Føroyum talvørindinum. Hann og føroyski telvarin John Rødgaard kennast væl, og tí avgjørdi hann at kom upp til Føroya í summarfrí. Danski stórmeistarin býr hjá John Rødgaard á Tvøroyri, og hevur millum annað roynt at verið í grind í Hvalba um vikuskiftið

Eftir at Havnar Telvingafelag frætti, at Petur Heine Nielsen var í Føroyum í summarfrí, setti teir seg í samband við danska stórmeistaran, og hann játtaða at koma til Havnar at telva simultan talv.

## Vann á Havnar Telvingafelag

Týskvøldið telvaði so danin simultan talv ímóti 22 limum í Havnar Telvingarfelag. Væl gekst hjá stórmeistarnum, tí hann vann sannførandi 21-1. Einasti telvarin, ið kundi standa danska stórmeistarinum kurl, var 17 ára gamli Jákup D. Joensen, sum óvænta vann sítt talv.

Peter Heine Nielsen brúkti góðan hálvan triðja tíma um tey 22 talvini. Eftir simultan talvið, avgjørdi danski stórmeistarin at geva Havnar Telvingarfelag ein møguleika aftrat.

Hesaferð vóru tað 18 telvarar, ið allir høvdu ein tíma hvør, meðan Peter Heine Nielsen bert hevði ein tíma um øll 18 talvini. Kortini vann danski stórmeistarin aftur sannførandi 13,5 – 4,5. Ronnie í Lon og Sigurð Justinussen vunnu síni talv, meðan Herluf Hansen, Carl Eli N. Samuelsen, Súni Jacobsen, Jóannes Guttesen og Regin Reinert allir fingu remis.

## FM í frælsum ítrótti

TÍÐINDASKRIV

**Um vikuskiftið var FM-kapping í frælsum ítrótti á Svangaskarði. Kappast varð á 400m-, 800m- og 5000m teinunum hjá monnum**

Stóri vinnarin gjørdist Evald við Garð úr kollafirði, ið vann øll trý FM-heitini. Evald venur niðri og setti herfyri persónligt met á 800m teininum við tíðini 2.00,4 min. Við hesi tíðini gjørdist hann fjór-skjótasti føroyingurin á 800m teininum yvirhøvur.

**Úrslitini í FM, vóru annars hesi:**

**400m**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Evald við Garð, Kollafirði, | 60,7 sek. |
| 2. | Jonhard Larsen, Treysti, | 65,3 sek. |

**800m**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Evald við Garð, Kollafirði, | 2.16,8 min. |
| 2. | Sølvi Reinert Hansen, Roysnið, | 2.20,5 min. |
| 3. | Samson Nesá, Gøtu, | 2.26,5 min. |
| 4. | Sigurð Justinussen, Bragdið, | 2.31,3 min. |
| 5. | Bogi Joensen, Treysti, | 2.37,9 min. |
| 6. | Martin Rói Vilhelmsen, Bragdið, | 2.46,9 min. |
| 7. | Robert Vilhelmsen, Bragdið, | 2.56,4 min. |

**5000m**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Evald við Garð, Kollafirði, | 18,12 min. |
| 2. | Sigurð Justinussen, Bragdið, | 18,15 min. |
| 3. | Jonhard Larsen, Treysti, | 18,16 min. |
| 4. | Samson Nesá, Gøtu, | 19,03 min. |
| 5. | Bogi Joensen, Treysti, | 19,14 min. |
| 6. | Suni Jacobsen, Bragdið, | 19,34 min. |
| 7. | Óli Olsen, Bragdið, | 19,46 min. |
| 8. | Robert Vilhelmsen, Bragdið, | 20,27 min. |